# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kirsten Mortensen**, fødd Gaard Jensen, ætta av Argjun, andaðist fríggjadagin 20. juli 65 ára gomul. Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum týsdagin 24. juli klokkan 15. Tey, sum vilja lata blómur ella krans, kunnu í staðin lata eina peningagávu á konto í Eik.

**Annebeth Johansen** av Strondum andaðist á Umlættingarheimnum í Gøtu 21. juli, 88 ára gomul. Farið verður úr Ellisheiminum í Runavík í Sjóar kirkju, týsdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Sjóar kirkju mikudagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Annebeth kunnu lata eina gávu til Sjóar kirkju.

†

Tað verður kunngjørt fyri ætt og vinum, at kæra móðir, vermóður, omma og langomma okkara

**Annebeth Johansen**
av Strondum

andaðist á Umlættingarheiminum í Gøtu 21. juli, 88 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Sjóar kirkju mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Samson og Karl Robert**

Tey, ið vilja minnast Annebeth, kunnu lata eina gávu til Sjóar kirkju.

## Prógv sum søluatstøðari



*Helgi á Reynatrøð (v.m.) og Jóannes Mouritsen frá Litaval*

Helgi á Reynatrøð úr Leirvík hevur í mai 2007 lokið yrkisútbúgving sum søluatstøðari við sergrein í máling. Lærupláss hansara var Litaval á Hjalla.

# Kaj Berg 70 ár



Hósdagin 12. juli fylti Kaj Michael Filipsen Berg í Hvalba 70 ár. Kaj er sonur Elsu Berg í Hvalba og Jòan Hendrik Poulsen úr Skopun. Kaj er elstur av átta systkjum. En systir býr í Hvalba, ein beiggi á Sandi og restin býr í Íslandi. Kaj sleit sínar barnaskógvar vesturi við Krógv hjá ommu og abba sínum.

Í 1961 giftist Kaj við Onnu Elisu, fødd Midjord, úr Hvalba. Hon er dóttur Kristionnu og Jákup Midjord við Neyst. Kaj og Anna Elisa eiga tvær døtur, Kirsten og Ketty, seks ommu- og abbabørn og tvey langommu- og langabbabørn.

Kaj hevur altíð verið sera arbeiðssamur maður. Longu sum 15 ára gamal fór hann til skips við »Drotti«. Har var hann í trý ár. Síðan fór hann til Íslands við trolara. Í 1970 fór Kaj til Grønlands at arbeiða sum kranførari hjá Hirth og Juul. Hann kom heim aftur til Føroya í 1977. Kaj arbeiddi síðan í Havn hjá Danberg & Sørensen í 10 ár. Hann byrjaði at arbeiða sum skúlatænari í Hvalbiar skúla í 1989 og har hevur hann verið líka til í dag, nú hann legði frá sær 70 ára gamal. Hetta arbeiði hevur dámt honum sera væl og hann passaði tað við lív og sál. Hann hevur ikki havt ein sjúkradag í hesi 18 árini, so hann hevur verið trúgvur. Kaj er eisini flaggpassari hjá Hvalbiar kommunu.

Kaj hevur altíð verið blíður og prátingarsamur maður. Honum dámar sera væl at práta við fólk og hann hevur nógvar kenningar kring landið.

Kaj er altíð til reiðar við einari hjálpandi hond, tá brúk er fyri tí. Hann hevur altíð verið sera góður við abba- og langabbabørnini. Ongantíð skuldu tey mangla nakað.

Eitt dømi um hetta var, tá Kaj arbeiddi í Havn. Elsta abbadótturin hevði leingi ynskt sær ein dukkuhest og hetta hevði abbin hoyrt, so hann leitaði Havnina upp og niður, líka til hann fann dukkuhesin og tá var abbadótturin glað.

Góði abbin og langabbin! Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Alt tað besta ynskja vit tær.

**Abba- og langabbabørnini**

# Gera rumlistrípur á Kaldbaksvegnum

FERÐSLUTRYGD
*Tíðindaskriv*



*Landsverk*

Í hesum døgum er Landsverk farið undir at gera rumlustrípur inn eftir Kaldbaksvegnum.

Arbeiði er partur av einari størri verkætlan, at ferðslutryggja Kaldbaksvegin, sum eisini tíðindafundur hevur verið um. Aðrir partar í hesi verkætlan eru millum annað at gera yvirhálingsforboð á pørtum á vegnum, og at seta ljós við tær stóru íbindingarnar á vegnum.

Rumlustrípurnar verða fresaðar niður í mið- og síðulinjurnar á vegnum. Hetta eru smá hol, ið gera, at tað fer at larma og ristast inni í bilinum, tá ið koyrt verður á tær.

Rumlustrípurnar eru serliga effektivar at verja móti eina- og møtiólukkum.

Kanningar í Danmark vísa, at rumlustrípurnar minka upp til 80% av hesum vanlukkum.

Arbeitt verður á strekkinum millum rundkoyringina við Føroya Tele og Sandvíkarhjalla í dag og í morgin. Mikudagin ella hósdagin verður vantandi fari inn til Kollafjaðrartunnilin, og so verður arbeitt millum tunnilin og Sund. Strekki millum Sund og Sandvíkarhjalla verður gjørt, eftir at tað er asfaltera av nýggjum í heyst.

- Meðan arbeitt verður, vilja vit heita á bilførarar at verða varnar meðan teir koyra framvið arbeiðinum, og ansa eftir arbeiðsfólkunum á vegnum, sigur Landsverk í tíðindaskrivi.